*ikki til lands. Teir, ið sjólótust við honum vóru: Óli Mikal Nielsen í Nýggistovu, 49 ára gamal, Niklas Jensen í Garðsenni, 38 ára gamal, Jógvan Joensen á Hólum, 37 ára gamal, Niels Pauli Villumsen á Skøvunum, 24 ára gamal og Tróndur Johannesen úr Skálum, 14 ára gamal og ættaður av Sandi.*

## Sjóriddarin fórst við átta monnum

Stutt eftir, at General Gordon var horvin, gekk toftaskipið Anna burtur við 17 monnum. Teir flestu av hesum komu aftur sum lík og vórðu jarðaðir í eini felagsgrøv í Reykjavík. Men tað var ikki nóg mikið við tí. Enn einaferð verða føroyingar og suðringingar skakaðir av eini vanlukku, og tað er Sjóriddarin úr Vági.

Um hetta hevur Føroyatíðindi eina frásøgn. Hetta blað kom út í Suðuroy, og tað verður brúkt sum høvuðskelda um hesa vanlukku og tær, sum hendu í 1920. Endurgivið verður sum tað varð skrivað á donskum. Hetta lýsir eisini best ófrættadámin, sum hevur merkt hesa skriving. Sagt verður:

Paa en frygtelig Maade er det i Forvejen saa uhyggeligt store Tal paa Ulykker i løbet af 1924 blevet forøget med Motorbaad Sjóriddarins Forlis og otte Driftige og dygtige Sømænd har faaet den samme vaade Grav som saa mange Færinger før dem.

Mandag den 24. November, der skulde blive en saadan Ulykkens Dag begyndte med smukt Vejr, og fra alle Suderøens Forskellige Bygder tog Baadene paa Fiskeri.

Ved tretiden om Eftermiddagen brød saa pludseligt og med stor Voldsomhed Uvejret løs, og Vaagbaadene, der havde fisket vestenfor Suderøen, begyndte øjeblikkeligt Sejladsen hjemefter men mødte, saa snart de havde passeret Sunnbiarenda, et Hav i det voldsomste Oprør. Særligt gjaldt det naturligvis Farvandet ud for Vaag Fjorden, hvor de mange Undervandsskær foraarsagede mægtige Grundbraad. En af Baadene søgte ogsaa klogelig ind paa Trangisvaag. De øvrige lykkedes det under store Farer at slippe ind paa Vaagfjorden, alle undtagen Sjóriddarin.

Om denne Baads Skæbne koncentreredes da efterhaanden alle de opskræmte Tanker og bange Anelser, og da en engelsk Trawler henad Aften kom ind til Vaag anmodede man straks dens Kaptajn om at stikke til søs igen for ar søge efter den savnede baad. Overfor disse henstillinger fastholdt imidlertid den engelske Kaptajn, at han ansaa det for praktisk talt umuligt at komme ud af Vaagsfjorden. Ved denne Tid havde da ogsaa Uvejret naaet en saadan Styrke, at kun faa mindedes noget lignende.

Da en af de hjemkomne Baade havde observeret Sjóriddarin passerende Sumbø, var der derfor kun det svage haab tilbage, at den skulde være vendt om for at søge ly vestenfor Suderøen, men næste dags Eftersøgninger tog hurtigt al Kraft ud af dette Haab, og Onsdagen kom saa Bekræftelsen paa de onde Anelser, idet Baadens Agterstævn blev fundet som Vraggods ved Vigerbirge. I det disede Vejr og uden noget Fyr at styre efter har den da sandsynligvis mødt sin Skæbne ved Vaagsfjordens Munding, maaske som følge af at være kommet for nær til Land og saa blive ramt af en Braadsø.

I Dagene siden ulykken skete, har Motorbaade søgte efter Ligene af de Forulykkede men uden Resultat. Havet, Færøernes vældige Krigergrav, synes at skulde blive deres sidste Hvilested.

Sjóriddarin var baade den yngste og største Motorbaad i Vaag og var forsynet med en 12 HK Motor. Den ejedes af firma P.H. Dahl.

## Teir sum fórust vóru:

- Gudmund Mikkelsen – Gudmund á Oyri, bátsformaður. Eftir sat einkja við fimm børnum.
- Mikkjal Pauli Christiansen, ættaðut úr Sumba. Eftir sat einkja við sjey børnum.
- Jákup Oluf A. Christiansen, elsti sonur Mikkjal Paula.
- Marius Augustines Hjelm, Marius hjá Akka. Eftir sat einkja við tveimum børnum.
- Poul Johannes Christiansen, Poul Johannes í Leynum. Eftir sat einkja við tveimum børnum.
- Ludvig Kristian Vilhelm, Luddi á Tjørn
- Jóhan S.A. Nordendal, Johan hjá Hanusi
- Niels Juel S. Magnussen, Niels Juel hjá Binu.

## Vitin kom táið vanlukkan var hend

Absalon Absalonsen greiðir frá í bók síni um Jóan Petur hjá Mouritsi, at Jóan Petur var á útróðri hendan dagin.

Hann var við Sjófrúnni í sama reiðarínum sum Sjóriddarin. Teir komu klokkan níggju inn eftir, teir høvdu eisini havt ein ringan túr. Teir høvdu strítt seg norðureftir, men ilt var at siga, hvussu langt teir vóru komnir. Jaspur hjá Akka var formaður og Jóan Petur stóð og stýrdi. Í einum glotta sóu teir eitt ljós í vestan. Tá sigur Jaspur við Jóan Petur: "Stýr beint á hatta ljósið og les kósina av." Tað køvdi av aftur, men við hesi kósini komu teir inn á fjørðin. Tað, teir høvdu sæð, meintu teir var ein lykt inni á bakka. Sjófrúgvin




*Hetta eru 16 teimum 19 av manningini á Helenu. Maðurin ovast til vinstru er Johannus Bolstad. Johannus Bolstad er uppkallaður eftir honum. Maðurin í niðasta raði, næstytst til høgru, er Jenis Hansen, sum Jens Bolstad er uppkallaður eftir. Næstuttast til vinstru í niðasta rað er Jacob Ludvig. Maðurin mittast í miðasta raðnum er skiparin Poul Michelsen. Myndina hava vit lænt frá Ragnhild Nielsen í Sandvík. Hon misti ein mannubeiggja og ein pápabeiggja við Helenu*

***Kennast fólk við aðrar av monnunum vilja vit fegin frætta***